FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN

Yviri við Strond 17 · Postboks 3018 · 110 Tórshavn

## SKRIVSTOVUNÆMINGUR

Hjá politinum í Tórshavn er eitt læripláss í skrivstovuyrkinum – almenn fyrisiting – leyst at søkja til setan 1. oktober 2009.

Umsøkjarar mugu hava staðið fráfaringarroynd fólkaskúlans og FHS-, HH-, Students- ella HF-prógv.

Lærutíðin verður fastløgd alt eftir, hvat prógv næmingurin hevur frammanundan.

Í lærutíðini skal næmingurin til Danmarkar á handilsskúla í 15 vikur tilsamans.

Løn verður veitt eftir sáttmála millum fíggjarmálaráðið og HK-felagið.

Umsókn, prógv og og møgulig viðmæli verða at senda Landfútanum, Yviri við Strond 17, Postboks 3018, 110 Tórshavn í seinasta lagi 4. september 2009.

**FØROYA LANDFÚTI**

***Tórshavn, tann 17. august 2009***
***Karen Marie Olesen***

Rigsombudsmanden på Færøerne

## Ændrede åbningstider

Rigsombudet er under ombygning i perioden 20. juli – 6. september 2009.

I denne periode er telefon- og åbningstiden mandag – fredag fra kl. 10 –12

**Rigsombudsmanden på Færøerne**

Postboks 12 | FO-110 Tórshavn | Tel. 35 12 00
riomfr@fo.stm.dk | www.rigsombudsmanden.fo

almannastovan

## Umsorgararbeiði 2010

Umsóknarfreistin fyri at søkja um fíggjarligan stuðul til umsorgararbeiði 2010 er:

**1. september 2009**

**Hesir bólkar/tiltøk hava rætt til umsorgararbeiði:**

1. Mattænastu til fólkapensjónistar.
2. Koyritænastu ella vitjunartænastu fyri pensjónistar.

**Umsóknin skal:**

1. Greitt tilskila, hvør søkir um stuðul og stendur fyri tiltakinum ella fyriskipanini.
2. Neyvt lýsa virksemið, ið stuðulin verður søktur til.
3. Neyvt útgreina upphæddina, ið søkt verður um, t.d. í lønarútreiðslur, útreiðslur til høli o.s.fr.
4. Upplýsa tal av starvsfólkum, og um hvør hevur ábyrgd av virkseminum.
5. Meta um tiltakið annars og grundgeva fyri tí ágóða, sum pensjónistar kunnu fáa av virkseminum.

Annars verður víst til kunngerð nr. 160 frá 21. desember 2005 um stuðul til umsorgararbeiði, broytt við kunngerð nr. 110 dagfest 15. desember 2008. Henda er at finna á www.logir.fo undir Almannaverk - Almannaviðurskifti annars.

**Umsókn skal sendast til:**

Almannastovan
Smyrilsvegur 20
Postrúm 3096
110 Tórshavn

**Umsóknirnar verða avgreiddar í seinasta lagi 15. desember 2009.**

**ZARTEC.NET** · *tlf. 225469*
*Zartecbygging@hotmail.com*

*Lat okkum hoyra frá tykkum og fá eitt gott tilboð.*

**ZARTEC**
**BYGGING**

**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 34 33 10 Fax: 37 12 53

## Størv á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi 800 Tvøroyri

**Sjúkrarøktarfrøðingur**
Søkt verður eftir einum sjúkrarøktarfrøðingi í fast starv frá 1. oktober 2009 ella eftir nærri avtalu.

Starvið er 0,7 í skiftandi vaktum.

**Heilsurøktari / sjúkrahjálpari**
Søkt verður eftir einum heilsurøktara/sjúkrahjálpara í fast starv frá 1.oktober 2009.

Starvið er 0,7 í skiftandi vaktum.

Nærri fast at vita um størvini við at venda sær til fyristøðukvinnuna tlf. 343310 lokal 3315.

**Setanartreytir**
Løn -og setanartreytir sambært sáttmála millum avvarandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvum v.m. verða at senda til:

Suðuroyar Ellis- og Røktarheim
Fyrisitingin
Box 51,
810 Tvøroyri

Ella

ssh@ssh.fo

**Umsóknarfreist: 7. september 2009**

## Lutaíbúð á 53 m² til sølu í Keypmannahavn

Íbúðin er umvæld í 2004 og er í góðum standi. Stórur grønur bakgarður, sum er nýumvældur í 2008. Liggur nær handlum, ítróttartilboðum og náttúru. Stutt inn til sentrum og gott buss- og toksamband.

Innskotið liggur á 650.000 kr (upprunaliga uml. 940.000) og húsaleigan 2.798 + fastar útreiðslur (uml. 500 kr.)

**Sí meira á www.hulgaardsvej124.blogspot.com.**

# Kunngerð

Broyting í gjøldum fyri burturkast og aðrar tænastur hjá Kommunalu Brennistøðini.

Gjørt verður kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi hin 25. juni 2009 hevur samtykt at seta í gildi nýggj gjøld fyri burturkast og aðrar tænastur hjá Kommunalu Brennistøðini.

Broyttu gjøldini koma í gildi 1. september 2009. Broyttu gjøldini eru at finna á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu, www.torshavn.fo.

**Tórshavnar kommuna**

i
Sosialurin




Falcon 26, árgang 2008, við 5 soviplássum og wc við septitanga. Báturin siglir 32 míl.

Longd: 8,25 m, breidd: 2,60 m.

**Eykaútgerð:** Radara, GPS, VHF, Stereoanlegg við hátalarum inni og úti, 15" sjónvarp v/DVD spælara, oljufýr, landstreym 230 volt, bógskrúva, stýring og regulator inni og úti, bjargingarbát til 6 persónar.

**Til sølu fyri 595.000 kr.**

**Tel. 288803**